gult cyan magenta svart

VI‹MERKINGAR

Minnisvar›in yvir hesa samgonguna ein Hvíta- og ein Svartabók

Sune Jacobsen



Tvær fer› sí›ani Heimast‡rislógin var› sett í gildi, hava vit havt samgongur, i› hava vilja› broytt vi›urskiftini munandi ímillum Føroyar og Danmark.

Tann fyrra, i› fekk navni› sjálvst‡rissamgongan, ráddi fyri borgum í tí›arskei›num frá 1962-1966. Hendan samgonga setti sær høg og bjørt mál. Úrsliti› var vánaligt. Ta› einasta, fólk minnast frá hesum tí›arskei›num, er, at jólaheilsurnar vór›u yvirtiknar. Hetta stendur sum minnisvar›in yvir ta samgonguna. Av gó›um grundum hoyra tey, sum ung eru í dag, líti› um hetta tí›arskei›i›, og hví skuldu tey ta›? Har var ikki nógv at reypa av. Og skuldu tey hoyrt naka›, so er ta› frá onkrum tjó›veldismanni, sum kann siga teimum, at Fólkaflokkurin sveik, so ta› stó› eftir. Hetta hevur veri› ringa samvitskan hjá Fólkaflokkinum sí›ani.

Hendan ringa samvitskan frá sekstiárunum var uttan iva grundin til, at Fólkaflokkurin skipa›i samgongu eftir vali› í 1998 saman vi› Tjó›veldisflokkinum. Høgni Hoydal kundi vísa á, at tit eru ikki smettin ø›rvísi enn fyrr, um tit ikki vilja skipa samgongu vi› okkum, tí tann møguleikan hevur veljarin jú víst á. Jú, Fólkaflokkurin var fanga›ur. Samgongan var› skipa› og fekk navni› fullveldissamgongan.

N‡ggja orakli› í Tjó›veldisflokkinum, Høgni Hoydal, gjørdist landsst‡risma›ur í fullveldismálum burturav. Fari› var› í stundini til verka, tí nú skuldi setast út í korti› og ta› so væl, at ta› skuldi ikki lirra í Nyrup, tá samrá›ingarnar vóru lidnar. Fyri at náa málinum skuldu tvey jarnbrot n‡tast. Anna› var Hvítabókin, hitt var Svartabókin. Stórar gongur av d‡rum serfrø›ingum, bæ›i innan og uttan landsst‡risgátt, løgdu høvur í blot.

Í me›an alt hetta hendir, situr ein føroyskur serfrø›ingur undir onkrum sk‡maskoti og kannar vesturlendsk skjøl frá kalda krígnum. Og grundin til at hann ger hetta, er, at Fíggjarnevndin hevur lati› seg drigi› upp á trá› av Finnboga Ísaksyni. FÍ hevur nevniliga sannført Fíggjarnevdina um, at Føroya fólk hevur krav upp á at kenna ta›, sum veruliga fór fram undir kalda krígnum. Fólkafloksmenn mótmæltu, tí so skuldu skjøl handan jarntjaldi› eisini kannast, men meirilutin helt, at frægast var at byrja í smáum, tí peningaríkiligheitin var ikki so stór.

Í eini handavend var Hvítabók li›ug. Vælgøddir embætismenn reistu land og ríki› runt fyri at sannføra veljaran um, at fullveldi› var á trappuni,uttan at ta› kosta›i tí einstaka naka›, og hev›i onkur hug at spyrja ein næskan spurning, so var svari›, at vit eru ikki politikara, og hatta var ein politiskur spurningur, og teimum svara vit ikki. Teir mugu bí›a til meistarin sjálvur, Høgni Hoydal, vísir seg fyri ásjón tykkara.

Rithøvundurin av Svørtubók fekk ikki gjørt arbei›i› li›ugt. Um hann var hungra›ur vi› vilja vi› onga játtan at fáa, skal eg lata vera ósagt, men undrunarvert tykist ta› mær, at samgongan ikki skuldi lata hann gera arbei›i› li›ugt, og enn meira undar ta› meg, at skjøl handan jarntjaldi› nú ver›a tagd burtur.

So var tí›indafundur í Tinganesi. Svartabók hev›i sæ› dagsins ljós. Skulu tit brúka hana undir samrá›ingunum vi› stjørnina, spurdi onkur tí›indama›ur. Nei, seg›i landsst‡risma›urin í fullveldismálum. Hvat skulu tit so brúka hana til, spurdu vit a›rir, sum høvdu játta› pengar til eitt verk okkum sjálvar, sum í fyrstu atløgu skuldi kasta ljós yvir ta›, sum hendi í vesturheiminum, og sí›ani skuldi kasta ljós yvir ta›, sum hendi handan jarntjaldi›.

Úrsliti› av samrá›ingunum kenna vit øll. Har hjálpti eingin Hvítabók, ei heldur nøkur Svartabók. Landsst‡risma›urin í fullveldismálum tykist ikki at brúka vanligt vit og skil. Hevur av øllum alvi brúkt sína tí› at forpesta vi›urskiftini millum ríkispartarnar, og hvørt mansbarn veit, at skulu vit uppnáa naka› vi› samrá›ingum, so er ney›ugt, at samrá›ingarandin er so gó›ur, sum til ber.

Aftan leiktjaldi› ni›ri á Christiansborg situr fólkatingsma›urin, Óli Breckmann, í skellilátri. Nú hevur hann, landsst‡risma›urin í fullveldismálum, f‡ra fer›ir rent á sker, sigur hann okkum, sum sita spent og lurta eftir tí›indum av flatlondum. Nú kann hann av røttum siga, at vit stu›la tykkum tjó›veldismonnum til ta› sí›sta, men úrsliti›, ta› má ver›a tykkara høvu›pína.

At øll fullveldisætlanin er miseydna›, ja, ta› vita vit øll. Hví útskrivar Anfinn Kallsberg, løgma›ur, so ikki n‡val, spyrja tey flestu. Jú, ta› er tí, at Anfinn, sum er eitt fri›ard‡r, hevur undir síni li› eitt taktiskt dovi› d‡r, sum eitur Óli Breckmann. Hann hevur uttan iva sagt løgmanni, at nú skulu vit steikja tjó›veldi› í sínum egna feitti. Tjó›veldi› kann ikki fara út í valstrí› vi› einari Hvítubók og einari Svørtubók. Tí er tvingandi ney›ugt at hava eina fólkaatkvø›u, sum eingin kann siga nei til. Í me›an hetta hendir, fer Fólkaflokkurin at gjara út, Karsten Hansen ver›ur tveittur av landskassalokinum, sum ver›ur opna› á ví›an vegg, og tá veljarakanningarnar vísa, at Fólkaflokkurin er nóg sterkur, ver›ur val útskriva›.

Úrsliti› av tveimum sjálvstyrissamgongum nú undan jólum tykist fara at ver›a: Svartabók, Hvítabók og jólaheilsurnar.

Heimurin hitnar

Johan Mortensen



Sum flestum kunnugt var› altjó›a fundur hildin í The Hague í farnu viku har so at siga allar heimsins tjó›ir vóru samankomnar at rø›a um alsamt vaksandi vandan av globalari upphiting og fylgjurnar av henni. Fundurin var eitt framhald av Kyoto samtyktini sum vi› sínari avger› um munandi skerjing av CO2 útláti, einahelst í ídna›arlondunum, og ø›rum fyribyrgjandi tiltøkum gav eina vón um eitt felags átak móti hesum risavanda sum longu hevur og kemur at hava ávirkan á okkum øll.

Tíanverri gjørdist fundurin í The Hague eitt stórt vónbrot og kom ongin semja burturúr. Hetta var sjálvandi stórt spell.

Ta› er at undrast stórliga yvir at almenna Føroyar ikki hev›i naka› umbo› á hesum fundi ! Ein kann spyrja um Landsst‡ri› ikki heldur at Føroyar eru partur av Heimsamfelagnum og at vit ikki skulu gera okkara til at bøta um hetta vandamál saman vi› okkara grannum? ella skulu vit ver›a tann ævigi "under dog" í Heimssamfelagnum.

Vit síggja hvussu havi› kring okkum og eisini Nor›sjógvurin er vor›in nógv heitari tey seinastu árini og vit fara at síggjar nógvar ógvusligar ve›urlagsbroytingar í komandi tí›um, ta› er ongin ivi um ta›.

Landsst‡ri› eigur at or›a ein grønan politik á hesum øki og fáa eitt tjak ílag so at allir Føroyingar skilja at vit øll somul kunnu gera naka› fyri at bøta um globala hiting sum í ringasta føri kann hótta Føroyska lívsgrundarlagi› um fiskurin hvørvur orsaka› av nevndu broytingum.

hygg & hoyr

Frá fríggjadegi 8. desember til hósdagin 14. desember

Rás 2 spennir seg út

Leygardagin fer Rás 2 at hava eina átta tímar langa undirhaldssending, sum hevur til endamáls at savna inn pening til Herberg Frelsunarhersins. Nógv ymiskt verður á skránni og fleiri gestir leggja leiðina í útvarpsstovuna, har teir báðir Óla Jákup Rólantsson og Sonne Smith fara at sita alt kvøldið.

Lagt verður til brots klokkan 17. Á skránni verður m.a. tónleikacafé, vitjan av áhugaverdum gestum og uppboðsøla. Møguleiki verður hjá lurtarunum at keypa listaverk av so mætum listamonnum sum Ingálvi av Reyni og Amariel Norðoy. Aðrir stuttligir lutir, sum verða at keypa, eru, signeraði tummastokkurin hjá Torbirni Jacobsen, fullveldisuppskotið hjá varaløgmanni og ein butterfly hjá Óla Breckmann í glasmontre. Allur peningurin frá tiltakinum fer óskerdur til sosiala arbeiði hjá Herbergi Frelsunarhersins.

Glottar

Marna Jacobsen ummælir:

Tú skal leita leingi eftir góðum sendingum í útvarpi og sjónvarpi. Men við hvørt hoyrir tú onkra ímillum allan tónleikin, sum eg giti tekur helvtina av senditíðini hjá útvarpinum ella ímillum alt hatta amerikanska brasið í sjónvarpinum.

Tvær høvuðshendingar hava verið hesa vikuna. Fyri tað fyrsta eru vit komin inn í jólamánaðan og samstundis mintust vit at 1. desembur er altjóða Aidsdagur.

Enn er ferð ikki komin á jólasendingarnar, hvørki í SVF ella í ÙF. Báðir stovnar hava tó jólasendingar fyri børnum. SVF hevur annanhvønn dag sending tey nevna Jallajól. Har er hugnalig stova, og týðiligt er, at hugsað hevur verið um at innrætta við nógvum litum og smálutum. Páll Danielsen spælir allar leiklutirnar, enn hava vit bara hoyrt um triðja Jullan ella Jollan ella Jallan. Teir báðir vit hava sæð eru sera ymiskir, annar er hugnaligur, eitt sindur heimføddur og elskar jól, hin er turrisligur, gírigur, hugsar altíð í talbanum, men báðum dáma at síggja jólafres, at lurta eftir sangkassanum og hoyra søgu úr svarta kassanum. Júst hesin søguforteljarin í svarta kassanum haldi eg er sera væleydnaður, málið er týðiligt, søgan er greið, har er onki uttanumtos og andlitsbragdið hóskar eisini væl til innihaldið, men kanska er tað tí at eg eri vaksin, tí eg havi varhuga av, at júst henda svarta kassan halda børn vera minst áhugaverdan.

Annars eru nógvar ábendingar um jólini í lýsingunum. Leygardagur varð aftur togdur í hvørjari lykkju, SMS lokkaði við tímatilboðum, og tað virkaði, er mær fortalt.

ÚF er sjálvandi eisini farin í gongd við jólasendingum í barnaløtuni, har er ein øgilig rópan og geylan. Eg fái so lítið og einki við.

Annað sum eyðkennir jólamánaðan eru allar bøkurnar. Tað merkist eisini á fjølmiðlunum. ÚF sendir »Úr bókarúgvuni« og SVF sendir »Bókajól«. Hjá teimum ið dáma at lesa er hetta guff. Annað bókmentaligt tilfar hevur eisini verið: sending úr Forum um bókamessuna, har ynskti eg at Ivan hevði fingið fatur á onkrum øðrum rithøvunda umframt Duritu Holm, men tað er kanska ov nógv forlangað? Sending hevur verið um 100 ára haldið til minnis um Jørgen Frants Jacobsen. Her kundi eg hugsað mær at ÚF kundi sent fyrilesturin hjá Hanne Flohr Sørensen, so øll tey í Havn og úti á bygd, sum ikki vóru í Norðulandahúsinum eisini fingu høvi at hoyra hann.

Hina hendingina Aidsdagin er minni gjørt við. ÚF hevur fram til 1. des. havt stuttar tíðindastubbar um øktar aidstilburðir í ymiskum londum og hevur vissað okkum um at so er ikki hjá okkum. Havt sera stutta samrøðu við Annu Samuelsen aidsráðgeva um Aids, um tað er neyðugt at halda áfram at upplýsa um aids. Tað heldur hon avgjørt og so sova vit bara víðari.

SVF hevði samrøðu við HIV-smittaðan ungling í tíðindasendingini, og lat meg siga at hatta var djarvt, ikki bert tí at hann sigur seg vera smittaðan, men eisini tí at hann ikki goymir at hann er samkyndur.

Vit hava hoyrt um samkynd fyrr og eisini um Aids, men ikki á henda hátt.

Tað vit eru von við, eru áskoðanir hjá monnum sum Petur O.K. Olufson, Jenis av Rana og teirra líkum, ið sjálvbestaltaðir seta seg sum dómarar yvir skapanarverkið. Við lyftum peikifingrum, intoliransu og avskeplandi fordómum, hava teir givið einum parti av fólkinum munnkurv, og í ringasta føri hava hesar áskoðanir rikið hesi fólkinum av landinum frá vinum og familju, burtur í fremmand lond, har tey frægari kunnu fáa frið at liva teirra lív, so sum Harrin hevur skapað tey.

Tá ið hesir sjálvbestaltaðu kristiligu dómarar, úttala seg í fjølmiðlunum, um hvussu gysiliga syndafult tað er at vera samkyndur, havi eg mangan hugsað: Gud viti hvat hesi menniskju hugsa og hvussu tey hava tað, ferð eftir ferð, at hoyra slíkt frá betrivitandi fólki, og ikki at vera før fyri at svara aftur ella bara geva teimum fingurin, tí sum unglingin sigur: hvat skal eg brúka hatta til?

Vit vita vónandi øll, at vit kunnu blíva smittaði av HIV, um vit eru samkynd ella ikki. Ella vita vit nú tað? Fjølmiðlarnir hava ikki gjørt nógv burturúr upplýsing um hetta evnið.

Innslagið í Degi og Viku hevði stóra ávirkan á meg, og eg ivist ikki í at nógv av teimum samkyndu í Føroyum, sum ikki longu eru flíggjaði og liva í útlegd í øðrum londum, hava fingið eitt gott høvi at viðurkenna seg sum samkynd og tora at vera við tað. Í so máta er hesin unglingin undangongumaður.

Bestubitar: Rúnatos

Síðsti maður á Skarvanesi

Túsund tónar

En fjende iblandt os